# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Minningarorð um
# John Nolsøe

**f. 26. mars 1935 d. 3. apríl 2005**



Góði John gubbi.

Sjálvt um eg eri ógvuliga kedd, so eri eg álíkavæl so glað fyri, at tú endiliga hevur fingið frið. Títt lív á hesi jørð var ikki lætt. Varð sjúkur í bestu árum og sjálvt um øll gjørdu sítt besta, fyri at tú skuldi hava tað gott, so var títt lív eitt stríð.

Tað verður mangan spurt, hvat meiningin er við lívinum, og ein kundi freistast at spyrja, hvat meiningin var við tínum lívi. Men eg ivist onga løtu í, at tað var ein meining. Uttan teg høvdu vit verið so nógv fátækari, vit hava verið so góð við teg og hava lært nógv av tær.

Alt tað eg minnist hava mamma og babba tikið meg við at vitja teg á Deild 5, og fekk eg longu sum smágenta innlit í, at tað eru summi fólk, sum ikki hava tað gott. At vera sjúkur í sálini er ikki lætt.

Tú var tá so mikið frískur, at vit kundu sita og tosa saman, og eg minnist serliga einaferð, tú segði,at tú var so keddur av, at tú ikki fekst børn, og at tú ikki fór at verða uppkallaður. Eg havi tá verið um 13 ára gomul, og eg lovaði tær, at um eg fekk børn, so skuldi eg kalla teg upp.

Tá Jóna 9 ár seinni varð fødd, var eingin ivi um, at hon skuldi eita eftir tær. Tú var bæði glaður og stoltur, og Jóna stóð hjarta tínum nær.

Sum árini gingu og tú fek tað verri, var verri at fáa eina samtalu í lag,men tú var altíð glaður, tá vit komu at vitja, bara vit ikki sótu ov leingi. Tosaði mest um sjúkur og at vit skuldu ikki mussa teg, tí tú kundi smitta okkum. Men hetta helt okkum ikki burtur. Eg havi, sum míni foreldur, altíð havt børnini við at vitja teg og tey blivu skjótt góð við teg.

Hetta seinasta árið hevur tú verið so sjúkur, at tú mangan ynskti at doyggja, og segði tað eisini: »Nú orki eg ikki meira, nú vil eg sleppa til Jesus pápan«.

Páskaaftan fylti tú 70 ár og vit vistu innast inni, at hetta fór at verða tín seinasti føðingardagur. Vit høvdu ein góðan dag saman, og sjálvt um tú var ógvuliga sjúkur, so visti tú, at tú hevði føðingardag og hvør var komin at vitja.

Hesa seinastu vikuna hava vit bíðað eftir, at tú skuldi fara og sunnukvøldið komu so boðini.

Góði John gubbi, eg takki Gudi fyri teg. Tú hevði eitt strævið lív, men tú var okkum ein dýrur skattur, sum vit vóru so ógvuliga góð við, og vit vita, at tú eisini var góður við okkum. Eg takki eisini Gudi fyri, at hann nú hevur tikið teg til sín, nú hevur tú tað endiliga gott og er komin til Jesus pápan.

At enda vil eg senda eina hjartans tøkk til starvsfólkini á Deild 5 og hinum deildunum, sum John gubbi hevur verið á. Tit hava verið so góð við hann og gjørt alt fyri, at hann skuldi hava tað gott. Takk fyri, at tit altíð hava tikið so væl ímóti okkum og hava havt eitt gott samskifti til familjuna hjá John.

Hvíl í friði, góði John gubbi. Vit síggjast!

**Anna**

# Diamantbrúdleyp



Hósdagin tann 7. apríl kunnu hjúnini Anna Sofía Elisabeth og Dánjal Petur Nielsen á Biskupsstøð í Klaksvík halda diamantbrúdleyp.

Anna er dóttur Bettu og Victorinus Joensen við Vágstúni í Klaksvík. Betta var ættað úr Árnafirði, dóttur Ulriku Joensen, ættað úr Miðvági, ið var systir Vága-Jógvan og Jógvan Mikkelsen úr Útistovu í Árnafirði. Victorinus var ættaður av Viðareiði, í Lágni, sonur Onnu Malenu, f. Olsen úr Funningi, og Heina Joensen, lærara úr Funningsfirði.

Tær vóru 4 systrar: Anna, Rikka, ið doyði 15 ára gomul, Valborg, ið býr í Noregi, og Jona, sum doyði bert 8 ára gomul.

Dánjal er sonur Kristionnu av Ryggi í Miðvági og Tummas Nielsen úr húsinum Norðan fyri Garð, úr sýslumanshúsinum í Sandavági. Pápi Tummas æt eisini Dánjal Petur Nielsen, og mamman, Anna Sofía, var slektað úr Bartalsstovu í Sandavági.

Diamantbrúðurin er fødd í Horni á Viðareiði, men kom til Klaksvíkar 10 ára gomul. Hon fór ung til Vágs til fastrina Juliu, sum var gift við Havna-Jørgin, og til farbróðurin Martin Joensen, Martin í Lágni, og Ceciliu, sum eisini búðu í Vági. Her arbeiddi Anna m.a. í handlinum á Løðhamri.

Seinni tænti hon í Havn hjá Ellu og Andru Sloan og hjá fam. Dahl Christiansen. Og undir krígnum var hoin stovugenta hjá Hilbert Amtmanni.

Dánjal var fyrst til skips, men kom til Havnar og arbeiddi á Tryggingarsambandinum. Hann búði tá hjá Alfredi Johannesen.

Og í Havn hittust tey bæði og giftust til Klaksvíkar í 1945. Tey eru fyrst í Klaksvík í eina tíð og flyta so til Sandavágs, har Dánjal arbeiðir hjá farbróðrinum Zachariasi Nielsen.

Men í 1946 koma tey aftur til Klaksvíkar, og tá byrjar Dánjal at arbeiða á skrivstovuni hjá Kjølbro og var høvuðsbókahaldari har. Tey byggja sær tá hús á Biskupsstøð. Dánjal arbeiddi á skrivstovuni hjá Kjølbro til 1960, men hevði tá eisini onnur arbeiði framíhjá. Hann arbeiddi partvís á skrivstovuni hjá Føroya Bjór, har hann hevði bókhaldið og seinni fulltíðararbeiði sum skrivstovustjóri. Hann hevði her nógvar hugsanir um, hvussu framleiðslan kundi økjast og kom m.a. við proppakappingini hjá Føroya Bjór. Hetta var meðan Gunnar Jørgensen var bryggjari.

Dánjal, Einar Waag eldri o.a. stovnaðu Norðoya Samvinnufelag og lótu Norðing byggja og síðani Norðalduna, og Dánjal var eisini stjóri har.

Hann hevði eisini í mong ár bókhaldið hjá Bureau Veritas í Føroyum, hjá Norðoya Blikksmiðju, J. Gerðalíð og Dáva Jacobsen o.ø.

Dánjal sat eisini í mong ár í umboðsráðnum í Føroya Banka. Hann stovnaði bókhaldið Føroyabók, har hann hevði bókhald hjá mongum útróðrarbátum og virkjum á landi, men í 1997 yvirtók sonurin Victor hetta virki. Og hann var í mong ár ein av stjórunum í Realinum og hann loysti Atla Dam av í sama stovni, meðan Atli sat løgmaður 1985-92. Hann var eisini í áratal form. í líkningarnevndini í Klaksvík, ein sog hann sat í býráðnum í Klaksvík fittan part av tíðini 1976-80 fyri javnaðarflokkin meðan Vilhelm var í tinginum.

Anna stovnaði handilin Føroyabók í 1967 í barnaheiminum í Vágstúni. Og seinni víðkaði hon handilin til Gávubúðini hjá Anni og hon var fremst við hesum slagnum av handli í Føroyum, og hon hevði kundar um alt landið.

Hon hevur stóra familjuvitan, er ættarkær og hjálpsom og er kend fyri hennara avbera góðu kleynur. Hon er frálík í tøting, serliga at binda og eisini at brodera.

Anna og Dánjal eru nú komin væl til árs, bæði gestablíð, hon kanska munnfimari. Tey hava int nógv okkara samfelagi at gagni, og tey hava teirra rimmarføstu gudstrúgv.

Tey eiga fýra børn og eftir aldrinum eru tey Jona, Kristianna, Bergfríð og Victor. Ommu- og abbabørnini eru ellivu í tali og tey eiga fýra langommu- og langabbabørn.

Eg og mong við mær ynskja tykkum hjartaliga tillukku á diamantbrúdleypsdegnum og blíðan byr framyvir.

**Michael Matras**

# Til ommu og abba á diamantbrúdleypsdegnum

Góða omma og abbi!

Vit ynskja tykkum báðum hjartaliga tillukku á diamantbrúdleypsdegnum. Takk fyri alt, tit hava verið fyri okkum.

Tað er ringt at finna orð, sum kunnu lýsa, hvussu góð tit hava verið við okkum øll, ommu- og abbabørnini.

Tykkara heim hevur altíð verið opið fyri okkum øllum, og vit hava kent okkum so væl hjá tykkum.

Omma, altíð klár við einum drekkamunni og einum góðum bita. So áhugað í øllum, ið vit gera, og umsorganarfull.

Abbi, stillur við fáum orðum, klókur og góðsligur. Serliga væl minnast vit allar biltúrarnar, vit hava verið við tær.

Hjartans takk fyri alt. Jesus verið hjá tykkum.

Heilsan

**Ragnhild og Andrias.**



*Í dag hava Anna og Dánjal P. Nielsen í Klaksvík diamantbrúdleyp*